## Fleiri feitir sjúklingar

Tey donsku sjúkrahúsini fáa nú trupulleikar av, at danir gerast ov feitir og ov tungir. JydskeVestkysten skrivar, at sjúkrahúsið í Aabenraa hevur fingið brúk fyri meiri enn einari song, sum kundu halda til sjúklingar, ið kunnu viga upp til 450 kilo. Tað hevur sjúkrahúsið ikki, og tí hevur onkur av teimum tyngstu sjúklingunum ligið á bóli. Hagtølini hjá danska sjúkrahúsverkinum vísa, at 4,4 prosent av sjúklingunum viga alt ov nógv, og talið á ovurfeitum dønum vaks ein fjórðing frá 2006 til 2007, skrivar JydskeVestkysten.



## Brúka ikki farloyvið

Danskir menn eru ikki so raskir at fara í barsilsfarloyvi sum menninir í Noregi, Svøríki og Finnlandi. Tað vísir ein kanning hjá kringvørpunum í teimum fýra londunum. Orsøkin er helst, at Danmark er tað einasta av teimum fýra londunum, sum ikki lutar pápanum ein ávísan part av farloyvistíðini. Tað ger, at skipanin er sjálvboðin, og tað ger tað torførari hjá monnum at fara í barsilsfarloyvi, verður sagt. Kanningin hjá kringvørpunum vísir, at tað eru srliga tey figgjarligu atlitini, sum gera, at danskir menn aftra seg við at fara í barsilsfarloyvi.

# Hjartamassasja bjargaði Eyðolvi



*Tað var í hesum svimjihylinum, at fimm ára gamli Eyðolvur Vang Dalsgarð varð funnin lívleysur*

**Fimm ára gamli Eyðolvur Vang Dalsgarð varð páskadag funnin lívleysur í einum svimjihyli hjá Danlandi í Søndervig í Danmark, tað eydnaðist tó at bjarga honum. – Tað er meira enn bara hepni, at hann er á lívi, hetta er meira eitt mirakul, sigur Lisbeth Vang, mamma hansara**

ÓHAPP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eyðolvur Vang Dalsgarð er í Danmark og ferðast saman við familjuni hjá sær, tá hann páskadag kom í neyð í einum svimjihyli hjá Danlandi í Søndervig í Jútlandi.

Drongurin lá á botninum inni í horninum í djúpa endanum á svimjihylinum, tá ein annar drongur sá hann og rópti um hjálp. Dorte Brandt Trillingsgaard, lívbjargari, gjørdi skjótt av og leyp eftir fimm ára gamla føroyinginum.

- Eg náddi bara at hugsa »oh shit«, hetta hendir bara ikki, sigur hon við tv2.dk.

- Hann skuldi fara í rutsjubanan, og pápi hansara skuldi taka ímóti honum. Hann kom bara ongantíð fram, og so varð hann funnin av hinum dronginum, sigur Lisbeth Vang, mamma, við Sosialin.

### Bjargaði lívinum

Tá drongurin var tikin upp úr hylinum fóru tey beinanvegin í gongd við fyrstuhjálp á lívleysa drongin, og eftir einar tveir minuttir merktu tey ein veikan puls.

Áðrenn tað var drongurin bláur, og onki lív var í honum. Tá drongurin kom til sín aftur, rópti eftir mammu síni at siga, at hann hevði ilt.

Men mamman var ikki beint har. Hon var nærindis, men fekk ikki boðini beinanvegin.

- Eg var nærindis, men stutt eftir ringdu tey til mín og tey fingu ikki samband við meg. Men tá tey fingu samband, fekk eg als ikki tosa. Eg misti ondina, og mátti bara koyra telefonina víðari, sigur ein týðiligt rørda mamman.

Seinni varð drongurin fluttur á sjúkrahús, og longu í sjúkrabilinum sat drongurin upprættur. Seinnapartin í gjár varð hann útskrivaður av sjúkrahúsinum í Herning.

### Mann má blíva við

- Eg eri so øgiliga sjokkerað og takksom, at hann kláraði tað, tí tað var veruliga ein spurningur um sekundir, sigur Lisbeth Vang, mamma. Hon greiði somuleiðis frá, hvussu týdningarmikið tað er, at mann ikki gevur upp.

- Mann má blíva við at geva hjartamassagu. Mann má ikki geva upp, sigur mamma Eyðolv Vang Dalsgarð.

Hon greiðir somuleiðis frá, at tey hava verið og tosa við hesi fólkini, sum vóru har, tá hann varð bjargaður, og at tað er nakað øll hava tørv á.

Um hendingina sjálva, er mamman glað fyri útfallið.

- Tað kundi verið heilt galið. Men hann hevur ongan sjónligan skaða, staðfestir mamman.

Fram til mánadagin verða tey 20 í ferðalagnum verandi í Danmark, og hon ivast ikki í, at henda hending fer at merkja restina av ferðini.

### Onki eindømi

Hendingin við fimm ára gamla føroyska dronginum er onki eindømi. Tað hava fyrr verið tvær aðrar hendingar, har ein gjørdist ein vanlukka og hin endaði líka væl, sum hjá føroyska dronginum.

- Vit gera nógv við at greiða gestum okkara frá, at tey svimja fyri egna ábyrgd, sigur leiðarin á Danlandinum við tv2.dk. Hann greiðir somuleiðis frá, at tey siga, at tey ikki hava lívbjargarar, umframt, at lívbjargararnir, sum eru har, hava góða útbúgving.

# 2000 litrar av olju á Kaldbaksfirði

**Eini tvey kubikk av olju eru í nátt farin á Kaldbaksfjørð. SEV eigur oljuna, sum av misgáum er farin á sjógv. – Tað var ein samanseting av menniskjaligum og tekniskum feili, ið vóru orsøkin, sigur Finn Jakobsen, tekniskur stjóri hjá SEV**

OLJUDÁLKING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Hóast heili 2000 litrar av olju eru farnir í Kaldbaksfjørð, so verður helst ikki talan um nakra náttúruvanlukku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í morgun lá ein filmur av olju eftir tí mesta av Kaldbaksfirði. SEV átti mistakið, ið hevði við sær, at ein heilt stór yvirbunkring varð gjørd, tá olja skuldi flytast úr goymslutanganum í dagstangan á Sundsverkinum.

Fyrr í dag greiddi Finn Jakobsen, tekniskur stjóri hjá SEV, frá, at talan helst var um einar 50 litrar av gasolju - ella diesel - sum vóru farnir á sjógv.

Men talan er um eina nógv størri mongd.

- Teir hava funnið fram til, at talan helst er um eini tvey kubikk av olju, ið eru farin á sjógv, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri í Havn, sum stendur fyri upptakinum.

### Stórt upptak

Tíðliga í morgun fór sløkkiliðið í Havn til verka at avmarka dálkingina.

- Tað hava verið einir tríggir mans til arbeiðis í morgun, at seta sperringar upp og so framvegis, og um eina løtu verða teir einir fýra, til maskinaríið er komið í gongd, og restina av degnum verða tað so tveir, ið fara at syrgja fyri, at oljan kemur upp, sigur Kartni Jacobsen.

Sløkkiliðsstjórin greiðir víðari frá, at teir hava gjørt ein lumma, sum oljan rekur inn í, og tá dagurin í dag er av, er øll oljan komin upp.

- Tíbetur er tað dieselolja, tí hon dampar skjótt og havið klárar væl at niðurbróta hana. Hevði tað verið tungolja, so hevði hetta verið ein katastrofa, so tað er hepni í óhepni, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri.

### Hepni í óhepni

Hóast tað er ein katastrofa í sær sjálvum, at yvirbunkring fer fram, so verður hetta ikki nøkur stór náttúruvanlukka.

- Dieselolja er tann frægasta av teimum øllum, og lotið liggur soleiðis, at tað mesta av oljuni liggur fram við landi, har tað er grót, so tað verður helst ikki nøkur náttúruvanlukka. Men eg skal ikki garantera, at onki djóralív verður rakt, greiðir Kartni Jacobsen frá. Hann greiðir víðari frá, at nágreiniligu mongdina av olju kennir mann ikki heilt enn, men at tað helst ikki fer upp um 2000 litrar.

### Alarmurin riggaði ikki

Tað eigur at vera ein ávaringarskipan, sum sigur frá, nær dagstangin er fullur, men hesin riggaði ikki, tá oljan skuldi flytast úr einum tanga í ein annan.

- Alarmurin segði ikki frá, og menninir vóru ikki klárir yvir tað, og tí hendir hesin lekin, greiðir Finn Jakobsen, tekniskur stjóri hjá SEV, frá.

Tá oljan er tikin uppaftur, fer sløkkiliðið at rokna út, hvat dálkingin hevur kostað, og eftir tað verður rokning send SEV, fyri dálkingina. Harafturat, kann SEV rokna við eini bót, sum tó ikki er so heilt stór.